# PEDAGOGBLAÐIÐ

*Í felag fyri teg*

Nr. 1 | Februar 2022 - aðalfundarblað | pedagogfelag.fo



**Betri vinir steðga happing**

**Eitt valevni ov lítið til námsfrøðingaráðið**

**AIEJI-ráðstevna í Sveis í september**

**Frágreiðing frá nevndini fyri farna árið**

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
2.200 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Skrivari
harald@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Nevndarlimur
annika@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Betri vinir steðga happing

**12** Keðilig ringrás steðgað

**14** Eitt valevni ov lítið til námsfrøðinga-ráðið

**15** Harald Joensen: Ymiskleikin førir okkum á mál

**18** AIEJI-ráðstevna í Sveis í september

**20** Valborg Heradóttir Hammer: Vit skulu duga at tosa fakið upp

**22** Gunnvá Akraberg Hansen: Eg havi nógv eftir at gera

**24** Frágreiðing frá nevndini fyri farna árið

**29** Soleiðis virkar valskipanin

**30** Kunning til limirnar

**31** Fundarskrá fyri ársaðalfundin





# ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# ENDILIGA FÁA VIT EIN VANLIGAN AÐALFUND AFTUR



Eg vil her takka øllum tykkum limum, sum tey tvey seinastu árini við koronu hava strekt tykkum at ytstu mørkum, tillagað arbeiðsdagin og muga tolt stórar broytingar á tykkara arbeiðsplássum.

Tit hava, hóast fá hava minst tykkum fyri tað alment, lyft eina sera stóra samfelagsuppgávu – summi við at halda samfelagshjólini gangandi, onnur við at vera lívlinjan hjá borgarunum út í samfelagið. Tit, sum hava avmarkað tykkara egnu sosialu sambond fyri at verja veik fólk; tit, sum hava arbeitt undir torførum umstøðum í vanda fyri sjálv at verða smittað og uttan at kunna brúka verndarútgerð; takk! Vónandi minnist arbeiðsgevarin tykkara stríð.

Endiliga fáa vit ein veruligan aðalfund aftur.

Tolið var um at verða uppi, nú koronuavmarkingarnar loksins vórðu tiknar burtur. Vónin var alla tíðina, at tað fór at bera til at hava ein vanligan aðalfund í 2022, men fyrst í januar tóktust útlitini tó at vera heldur døpur. Vit fegnast tí um, at til bar at flyta aðalfundin, soleiðis at ongar avmarkingar nú verða, og vit kunnu savnast sum vanligt.

Freistin at leggja uppskot fyri aðalfundin er nú farin, men tað er ikki ov seint at skráseta seg til aðalfundin. Tað ynskja vit, at tit gera skjótast gjørligt, soleiðis at fyrireikingarnar kunnu ganga so væl sum gjørligt.

Aðalfundurin er skipaður í tveimum, har hjálparfólk, námshjálparar, pedagogiskir assistentar og pedagogisk ábyrgdarfólk fyrst hava ein aðalfund við hjálparfólkaráðnum. Tað er tó longu greitt, at Hansine Brandt og Oda Dalfoss verða afturvaldar í ráðið.

Námsfrøðingar, námsfrøðiligir ráðgevarar ella verkstaðsassistentar hava ein aðalfund við námsfrøðingaráðnum, har kunngjørt verður, hvør er valdur í námsfrøðingaráðið. Her er tað eisini greitt, at tey fýra, sum bjóða seg fram, verða vald. Tó er ikki greitt, hvør verður valdur fyri trý ár, og hvør verður valdur fyri tvey ár. Tað fara atkvøðurnar at avgera. Spurningurin er so eisini, um námsfrøðingaráðið fer at ynskja ein eykaaðalfund fyri at verða fullmannað.

Eisini skulu leiðarar, eindarleiðarar og varaleiðarar hava sín aðalfund. Her er leiðararáðið tó fullmannað.

Vit hittast øll til felagsaðalfund, tá hesir smærru ráðsaðalfundirnir hava verið. Aðalfundurin verður settur við einum gestarøðara úr Danmark, nevniliga Benny Andersen, formanni í Socialpædagogerne. Benny er eisini forsetið í AIEJI, sum er altjóða felagsskapur fyri sosialnámsfrøðingar.

AIEJI hevur aðalfund og ráðstevnu í Sveis í september í ár – og tað er ein ráðstevna, ið tit eisini hava møguleika at taka lut í.

Tey, sum taka lut í aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag, fáa so eisini møguleika at vera við til borðhaldið seinni um kvøldið.

Í blaðnum hesaferð er nógv tilfar um og til aðalfundin. Tit fáa lisið og sett tykkum inn í tað, sum er hent í felagnum síðan seinasta aðalfund og samstundis gjørt tykkum eina mynd av teimum trimum valevnunum, Gunnvá Akraberg Hansen, Haraldi Joensen og Valborg Heradóttir Hammer, sum bjóða seg fram til nevndina. Tey bæði, sum fáa flestu atkvøðurnar vera nevndarlimir, meðan tann við triðflestum atkvøðum verður tiltakslimur.

Vit skulu eisini viðgera eitt uppskot um, at Pedagogblaðið aftur verður prentað til allar limir hvørja ferð. Seinnu árini hava vit prentað aðalfundarblaðið til øll. Hinar tríggar útgávurnar hava verið avmarkaðar til arbeiðsplássini sum prentað blað, men øll bløðini kunnu altíð lesast sum pdf-útgávur á heimasíðuni.

Við hesum fari eg vegna nevnd og umsiting at bjóða tykkum vælkomin á aðalfundin 5. mars 2022.

Tilmeldingin fer fram á heimasíðu felagsins.



*– Ónd børn eru ikki til, bara ónd mynstur. Tað eru altíð tey vaksnu, sum hava ábyrgdina, eisini av happingini, sigur Sára Henriksen, námsfrøðingur og undirvísari í Betri vinir-átakinum hjá Barnabata*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Betri vinir steðga happing

**Støðugt arbeiði við Betri vinum-skránni bøtir um evnini hjá børnum at vísa kenslur, og empatisku evnini gerast betur. Tað vísir gransking á økinum. Hetta er við til at økja um trivnaðin og fyribyrgja happing. Betri vinir hava fimm ár á baki á føroyskum í Føroyum, og úrslitini eru góð**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Nógv fokus hevur verið á happing ímillum børn seinastu árini, og "Betri vinir – Fri for mobberi" hjá Barnabata er eitt ítøkiligt átak at fyrbyrgja happing ímillum børn.

Sára Henriksen, námsfrøðingur, er Betri vinir-undirvísari og -samskipari hjá Barnabata við síðuna av sínum arbeiði sum námsfrøðingur á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum.

Betri vinir-skeið eru til starvsfólk og leiðarar á dagstovnum, frítíðarskúlum og innskúlingini.

Málbólkurin hjá Betri vinum er starvsfólk, foreldur og børn. Sára Henriksen leggur dent á, at tað er týdningarmikið, at allir partar eru við í tilgongdini, fyri at røkka best møguligum úrslitum.

## Krúnprinsessan tók stigið

Betri vinir er umsett og føroyskað frá danska antihappingarátakinum 'Fri for mobberi'.

Til ber at lesa um Betri vinir á barnabati.fo og á facebook-síðuni "Betri vinir - Fri for Mobberi". Á barnabati.fo ber eisini til hjá dagstovnum at keypa Betri vinir-skeið.

Til ber eisini at skriva til betrivinir@barnabati.fo at útvega sær meira kunning.

Tað eru Mary Fonden og Red Barnet, sum hava ment Fri for Mobberi, og stigtakarin var sjálv Mary krúnprinsessa við íblástri úr Avstralia.

Átakið er nú útbreitt úr Danmark til Føroya, Ísland, Grønland, Estland og Rumenia. Altjóða heitið er Free of Bullying

Í 2017 bleiv tilfarið føroyskað og lagað til føroysk viðurskifti, og her heima er heitið altso Betri vinir. Danska tilfarið hjá Fri for mobberi miðar eftir aldursbólkinum 0-9 ár, men Betri vinir hevur føroyskt tilfar tøkt til børn upp til seks ár, býtt á aldursbólkarnar 0-3 og 3-6 ár.



*Sára Henriksen arbeiðir sum námsfrøðingur á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum og røkir arbeiðið við Betri vinum við síðuna av*

Mynd: Ingolf S. Olsen

– Stórur eftirspurningur er eisini eftir tilfarinum 6-9 ár, men vegna vantandi fígging hevur tað ikki verið møguligt hjá Barnabata at føroyska til hendan aldursbólkin enn, sigur Sára Henriksen.

## Tað riggar

Sára Henriksen hevur saman við tveimum øðrum undirvísarum havt skeið í Betri vinum fyri eini stívligari helvt av teimum føroysku dagstovnunum og vónar, at restin eisini fer at taka Betri vinir til sín, sum frá líður.

– Átakið virkar væl, tað vísir granskingaðrastaðni, har konseptið verður brúkt, til dømis í Danmark, og afturboðanirnar, eg fái frá námsfrøðiligum starvsfólkum, sum arbeiða við Betri vinum, eru sera jaligar. Sum eitt starvsfólk segði: "Endiliga ein arbeiðsháttur, ið leitar fram eftir og ikki bert er ein lappaloysn". Granskingin staðfestir eisini millum annað, at støðugt arbeiði við Betri vinum ger, at børnini duga alsamt betur at vísa kenslur, og teirra empatisku evni gerast betur, sigur hon.

– Eitt starvsfólk á einum stovni hevur sagt mær, at børnini eru vorðin meira umsorganarfull og inkluderandi yvir fyri hinum børnunum. Tey eru blivin raskari at ugga sínar spælivinir og at hjálpa til at loysa tvístøður, sigur Sára Henriksen.

Betri vinir er eitt konsept, har nakrir tættir liggja fast, og grundvirðini eru altíð tey somu, men kortini er meginreglan, at arbeiðið verður tillagað, so tað riggar til ein sjálvan og viðkomandi stovn.

Sum dømi um tað endurgevur Sára Henriksen afturboðini, hon hevur fingið frá einum námsfrøðingin á einum barnagarði:

"Mín starvsfelagi skipar ofta fyri felagsspølum, onkuntíð er tað hugskot frá Betri vinum, aðrar tíðir eru tað spøl, sum hann kennir frá




***Fimm góð ráð til at tosa við barnið um kenslur***

*1. Viðurkenn og gev rúm fyri kenslunum hjá tínum barni.*
*2. Skil ímillum kenslur og gerðir.*
*3. Hjálp barninum at skilja hví kenslan tók seg upp.*
*4. Tosa um, hvussu onnur kunnu hava tað.*
*5. Hjálp barninum at bera seg hóskandi at í samband við kenslur*



*Ein týðandi figurur í Betri vinir-tilfarinum er lillalitta bamsan. Við í barnagarðskuffertinum og vøggustovumappuni eru smáar bamsur til hvørt barnið og ein handskabamsa til tann vaksna. Tær smáu bamsurnar fylgja barninum frá vøggustovu, til tey fara úr barnagarðinum. Tá flytur hon við heim*

sínum barnaárum. Buldrasligt felagsspæl er ikki akkurát eg. Mær dámar ordiliga væl samrøðutalvurnar og rolluspæl, so tað geri eg."

- Hon brúkar tískil tað tilfarið, sum gevur meining fyri hana, og sum hevur hennara áhuga. Tilfarið hjá Betri vinum er hugsað sum íblástur og amboð at leggja afturat námsfrøðiliga arbeiðinum annars. Tað er als ikki neyðugt, at alt tilfarið er virkið í senn. Har er so nógv tilfar, og eg havi ikki møtt nøkrum enn, ið brúkar alt tilfarið í senn, sigur Sára Henriksen.

## Hugaligt kanningarúrslit

At Betri vinir er gagnligt í námsfrøðiliga arbeiðinum, vísir ein spurnarkanning, sum danska Fri for mobberi í 2011 gjørdi á donskum dagstovnum.

Helvtin av teimum spurdu hildu, at børnini dugdu betur at handfara happing, og 60 prosent hildu, at børnini vóru blivin meira hjálpsom mótvegis hvørjum øðrum.

Ikki minni enn 98 prosent av teimum spurdu søgdu, at tey vildu halda fram við at nýta Fri for mobberi og vildu viðmæla øðrum at gera tað sama.

Betri vinir – og systurátøkini í øðrum londum – er eitt fyribyrgjandi átak ímóti happing, og tekur støði í teimum fýra grundvirðunum: Tolsemi, virðing, umsorgan og dirvi.

## Myndir og bamsur

Tilfarið í Betri vinir byggir á námsfrøðiligt ástøði og námsfrøðilig amboð, har myndir eru ein grundleggjandi partur av tilfarinum, ætlað til børnini. Til dømis myndir av børnum, sum vísa sína sinnisstøðu í ymiskum tvístøðum. Afturkennandi figururin í tilfarinum er ein lillalitt bamsa.

Til barnagarðsbørnini, sum er aldursbólkurin 3-6 ár, er tilfarið savnað í “barnagarðskuffertinum”, og tilfarið til vøggustovurnar, tað eru tey 0-3 ára gomlu, er savnað í “vøggustovumappuni”.

Alt tilfarið byggir tó á sama ástøði og tekur støði í teimum fýra grundvirðunum tolsemi, virðing, umsorgan og dirvi.

Summi amboð og arbeiðshættir ganga aftur hjá báðum aldursbólkum, meðan sumt er ymiskt. Í báðum førum eru til dømis fakhefti við ástøði og hugskotum til virksemi, persónligar bamsur til børnini, massasjuætlan og myndir av kenslum og sinnisstøðum.

## Ónd børn eru ikki til

Við hesum amboðunum læra børnini um kenslur hjá sær sjálvum og hjá øðrum.

– At læra um kenslur hjá sær sjálvum og hjá øðrum er grundleggjandi fyri at megna at handfara tvístøður og at arbeiða víðari við teimum fýra virðunum, sigur Sára Henriksen.

Samanumtikið er málið við Betri vinum at gera tað lættari at styrkja barnafelagsskapin, skapa inkluderandi barnabólkar og tískil fyribyrgja happing, greiðir hon frá.

– Nógv skilja happing út frá tí, tey síggja. Sum nakað, ið fer fram millum ein happara og eitt offur. Men gransking seinastu árini hevur givið eina aðra mynd av happingini. Nú vita vit, at tað ikki eru ávís børn, sum eru upprunin til happingina og sum so hava skyldina av henni. Upprunin er hinvegin í mentanini í tí felagsskapinum, sum børnini eru ein partur av. Tí er tað sera umráðandi at gera sær greitt, at ónd børn eru ikki til, bara ónd mynstur.

Tað eru altíð tey vaksnu, sum hava ábyrgdina, eisini av happingini, sigur Sára Henriksen.

## Ein lærurík tilgongd

Sjálv bleiv Sára Henriksen hugtikin av Betri vinum-hugsanini, tá hon sum nýútbúgvin námsfrøðingur fór á Fri for mobberi-skeið við sínum arbeiðsplássi. Tað var áðrenn, Barnabati hevði sett sjøtul á at føroyska tilfarið og lagt lunnar undir Betri vinir, so tilfarið var danskt og undirvísararnir danir.

– Eg fall púrasta fyri hesum, at Fri for mobberi var ein kombinasjón av námsfrøðiligum ástøði og ítøkuligum amboðum, sum eru einføld at brúka. Hetta tendraði mín eldhuga fyri Betri vinum, sum eg eri so sera takksom fyri.

– Vit arbeiddu við tí danska tilfarinum fram til 2017, tá Barnabati gav út Betri vinir – Fri for mobberi. Onkuntíð kundi eg brúka mína fyrireikingartíð upp á tað, men sum oftast mátti eg umseta í løtuni – til dømis umseta orð fyri orð, tá eg las søgu, ella tá eg brúkti samrøðutalvu.

– Akkurát tann parturin, at umseta alt, var ikki altíð so lættur og hugaligur. Eg kann siga fyri meg, at nú vit hava tað føroyska tilfarið, so er tað nógv meira einfalt, meira beinrakið og meira hugaligt at brúka, greiðir Sára Henriksen frá.

## Mentan og atburður broytast

Serliga hugaligt er tað, tá góðu úrslitini verða eyðsýnd.

– Eg havi onkuntíð spurt meg sjálva og mínar starvsfelagar, um munur er á mentanini og atburðinum í barnabólkinum nú, og áðrenn Betri vinir bleiv ein inngrógvin partur av okkara mentan. Stutta svarið er ja.

– Børnini eru ótrúliga røsk at hjálpa hvørjum øðrum, tá onkur er keddur, og tað hendir fleiri ferðir ígjøgnum dagin, at vit gerast heit um hjartað av at síggja, hvussu hjálpsom og kærleiksfull børnini kunnu vera, sigur Sára Henriksen.

Tað eru tó ikki bara í broyttu mentanini millum børnini, at farvegurin eftir Betri vinum sæst. Eisini starvsfólkamentanin er broytt, staðfestir hon.

– Nú eri eg so heppin, at eg bleiv ein partur av einum arbeiðstoymi, har sera góður trivnaður og arbeiðsgleði var frammanundan, men kortini sæst munur á.

– At arbeiða í barnagarði krevur ótrúliga nógv samskifti og samarbeiði ímillum okkum starvsfólk. Ofta krevst eisini stórt dirvi at tora at siga frá, um onkur er farin út um okkara mørk. Persónliga havi eg lært nógv av at hyggja inn eftir í arbeiðinum við Betri vinum. Tí tá vit arbeiða við ella eru um børn, mugu vit altíð hyggja at okkara egna leikluti, okkara egna atburði og máta at hugsa uppá, sigur Sára Henriksen.

## Vantandi tolsemi er orsøkin

Orsøkin til, at happing fer fram ímillum børn, tað veri seg til frítíðarítriv, á dagstovni ella í skúla, kann sambært henni samanfatast við tveimum orðum: Vantandi tolsemi.

Happing er eitt bólkafyribrigdi, sum sleppur at gera um seg, tá karmar og umstøður hjá børnunum ikki virka. Vánaligt tolsemi ger, at øll halda eyga við hvørjum øðrum. Tann, sum traðkar við síðuna av og ger okkurt "skeivt" ella øðrvísi, kann skjótt gerast tað næsta offrið. Happing hongur tætt saman við tí at vera ein partur av felagsskapinum. Tað følist sera óbehagiligt, um vit ikki kenna okkum sum part í felagsskapinum. Fyri ikki at standa einsamalt, bólka børnini seg saman, og happingin er tá frá tí felagsskapinum. Granskingin vísir, at áhaldandi happing kann hava álvarsamar sálarligar og kroppsligar fylgjur, so sum tunglindi, innlæringstrupulleikar og í ringasta føri sjálvmorðstankar. Tí er tað so sera álvarsamt og alneyðugt, at hond verður tikin um trupulleikan frá grundini, soleiðis at skeld og happing ikki gerst ein náttúrlig reaksjón og atferð hjá børnunum, leggur Sára Henriksen dent á.

Hon vísir á, at Betri vinir eisini er eitt hent fyribyrgjandi amboð at hava til taks, tá ytri umstøður, eitt nú vantandi játtanir til dagstovnar, skapa gróðrarbotn fyri mistrivnað. Sára Henriksen leggur tó sera stóran dent á, at Betri vinir sum amboð er ætlað at verða brúkt av børnum og starvsfólki í felag og ikki í staðin fyri starvsfólk.

– Tá børnini eru vand við Betri vinir-skránna, fara tey at duga at loysa sínar trupulleikar í felag.

– Tá børn hjálpa børnum, gevur tað báðum pørtum nógv. Tað er stórt at megna at hjálpa einum øðrum, og tað er fløvandi at fáa hjálp frá sínum spælivinum – og tá børn hjálpa børnum, hava vit starvsfólk nógvar lítlar hjálparar – sjálvandi við teimum avmarkaðu førleikum, sum børn hava – sum vit starvsfólk og børnini sjálv kunnu heita á ígjøgnum dagin, sigur Sára Henriksen brosandi.

# Eru tíni fakfelags-viðurskifti í rættlag



Tað hevur týdning at vit hava teir røttu upplýsingarnar um teg, soleiðis at vit fáa sett okkum í samband við teg, og at tú fært tíni limarættindi, atgongd til kunning, upplýsingar og røttu atkvøðugreiðslur hjá felagnum.

Limarættindi eru millum annað tryggingar, møguleiki at fáa hjálp og vegleiðing frá umsiting felagsins, um neyðugt løgfrøðiliga hjálp og gevur tær eisini atgongd til ein limaportal og limakort, sum aftur gevur atgongd til tilboð frá ymiskum handlum.

Um tú ikki ert skrásettur sum limur – far inn á heimasíðuna, og skráset teg har, bið arbeiðsgevaran flyta limagjald til Føroya Pedagogfelag og kanna tín lønarseðil og fylg við har, um limagjaldið er flutt.

Um tú ikki hevur fingið teldupost ella pedagogblaðið sendandi seinastu mánaðirnar, er vandi fyri at tú ert skeivt skrásettur, dottin úr limaskrásetingini ella at onkur feilur er.

Tú kann seta teg í samband við felagið fyri at vita, hví so er: pedagog@pedagogfelag. fo ella telefon 357576, mánadag til hósdag millum 09.00 og 15.00.



# KEÐILIG RINGRÁS STEÐGAÐ

**Tað ber til at broyta óheppin mynstur, men tað tekur tíð, sigur Sára Henriksen, sum her vísir á ítøkiligt dømi um hetta**

*Mynd: Dagstovnurin á Hamrinum*

**INGOLF S. OLSEN - PRESS**

Sára Henriksen, undirvísari hjá Betri vinum, vísir á, at tað tekur tíð at broyta eina mentan og atferðarmynstur – ikki bara hjá børnum, men sanniliga eisini hjá teimum vaksnu. Eitt nú at broyta mátan, sum tey vaksnu "plaga"at reagera upp á, tá børnini koma í tvístøður, og hvussu tey vaksnu uttan at hugsa seg um bera seg at í óvæntaðum støðum – um tað so er millum børnini, millum foreldrini ella við eitt starvsfólk.

Tað tekur tíð, men tað ber til at broyta eitt mynstur, sigur Sára Henriksen og greiðir frá einum dømi, har ein keðilig atferðarringrás hjá nøkrum børnum á hennara stovni bleiv steðgað, við at starvsfólkini sjálvi steðgaðu á og hugdu at sínum egna leikluti:

– Vit høvdu samling við børnunum hvønn dag áðrenn matpakkan. Ella rættari sagt, vit royndu at hava samling við børnunum. Vit høvdu tað satt at siga rættiliga trupult við fimm gentum, sum noktaðu at koma til samling. Tær rýmdu ella goymdu seg. Og um tað eydnaðist at fáa tær við, so larmaðu tær og gjørdu fortreð.

– Eg minnist mína frustrasjón yvir, at tær vóru so ómøguligar, so okkurt mátti henda. Vit spurdu okkum sjálv, hví hetta hendi, og hvat vit kundu gera. Tá vit góvu okkum stundir at reflektera yvir spurningin, vistu vit væl svarið. Vit vóru komin í eina keðiliga ringrás, har vit vaksnu kravdu nakað, sum vit nú sóu, at hesar genturnar hvørki maktaðu ella sóu meiningina í.

– Væntanir, treytir og mátin, vit starvsfólk vóru upp á, riggaði ikki til hesar genturnar. So vit máttu broyta okkara tilgongd. Gentunum dámdi hugna í smáum bólkum. So hetta bleiv leisturin í eina tíð.

– Síðan flættaðu við so líðandi ymisk Betri vinir-evni uppí.  Vit sóu tá eina broyting í hesum gentubólkinum. Trivnaðurin bleiv betri upp, og sambandið og samskiftið við okkum vaksnu og hini børnini bleiv nógv betri.

– Tað tekur tíð at broyta eina mentan og eitt mynstur millum børnini, men sanniliga eisini millum tey vaksnu.

Sára Henriksen leggur dent á, at fyri at Betri vinir skal eydnast, skulu virðini vera í øllum løgum í námsfrøðiliga arbeiðinum.

– Innbjóðandi smíl, vinaligt eygnasamband og heit klemm eru til dømis týdningarmikil. Tað skal eitt nú síggjast aftur í, hvussu vit tosa okkara millum, hvussu vit koma inn í rúmið, og hvussu vit møta børnum og foreldrum.

– Betri vinir skal ikki bara vera virkið, tá vit sita í samling, og ikki bara tá vit vaksnu orka, ella tá vit ætla at ávirka og læra frá okkum. Okkara atburður ávirkar altíð – vit ávirka bara við at vera til staðar, sigur Sára Henriksen.

– Tað hevði sjálvandi verið ynskiligt, at eitt kuffert við litríkum tilfarið einsamalt gjørdi undurverkið og steðgaði allari útihýsing og happing, men tilfarið í barnagarðskuffertinum og vøggustovumappuni gera ikki arbeiðið í sær sjálvum.

– Trivnaður og gleði í barnabólkinum er treytað av felagsskapinum, starvsfólkunum og einari leiðslu, ið ynskir og raðfestir ein sunnan og góðan felagskap, sigur hon.

# EITT VALEVNI OV LÍTIÐ TIL NÁMSFRØÐINGARÁÐIÐ

**Tað er longu nú greitt, at námsfrøðingaráðið hjá Føroya Pedagogfelag ikki fer at verða fullmannað eftir aðalfundin 5. mars. Tí verður helst eykaaðalfundur bara fyri tað ráðið seinni**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Val verður eisini til námsfrøðingaráðið á aðalfundinum 5. mars, og hóast øll tey fýra valevnini, sum stilla upp, kunnu verða vís í vali, skal atkvøðast. Tí atkvøðubýtið ger av, hvussu long skeiðini hjá hvørjum einstøkum ráðslimi verða.

Nummar eitt, tvey og trý verða nevniliga vald at sita í trý ár og nummar fýra í tvey ár. Av røttum skuldi ein fimti ráðslimur eisini verið valdur at sita í tvey ár, men tað eru altso bara fýra valevni, sum hava bjóðað seg fram.

Orsøkin til, at alt ráðið skal veljast nú, er, at ráðslimir hava sagt seg úr ráðnum. Hini ráðini vóru eisini í tí støðuni, men høvdu eykaaðalfundir í fjør og blivu tá fullmannað aftur. Eisini námsfrøðingaráðið skuldi hava eykaaðalfund í fjør, men hvørja ferð, ætlanir vóru um tað, foraði korona hesum.

Hesi eru valevnini til námsfrøðingaráðið; tey hava fingið møguleikan at siga eitt sindur um seg sjálv, og hví tey stilla upp, og eiga sjálv orðini undir myndunum:



*Krista Hvannastein, 42 ár, námsfrøðingur í 16 ár, arbeiðir í barnagarðinum Mylnuhúsið.*
*– Eg havi møtt nógvum børnum og teirra familjum ígjøgnum øll hesi 16 árini sum námsfrøðingur, og eg vil siga, at tað hevur verið ein sonn gleði at hava havt eina ávirkan á teirra lív og menning. Eg standi fyri rættvísi, sínamillum virðing, og at børn og starvsfólk mennast og hava tað gott og stuttligt*



*Anja Haldansen, 45 ár, útbúgvin námsfrøðingur 2015, arbeiðir í serstovuni Melini í Vestmanna skúla.*
*– Eg havi eisini arbeiðsroyndir innan dagstovnaøkið og sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlanum*



*Gunn Maritudóttir, útbúgin námsfrøðingur í 2014, arbeiðir nú á Miðstovninum.*
*– Eg havi áhugað fyri fakfelagsarbeiði og ynski at vera við til at styrkja og lyfta námsfrøðiliga fakið. Eg haldi tað vera umráðandi við einum námsfrøðingaráðið, har jaligt ljós verður varpað á okkara fak, og har vit kunnu verða við til at vaksa um áhugan at lesa til námsfrøðing, og har námsfrøðingar trygt kunnu venda sær til*



*Tina Tórarenni, útbúgvin námsfrøðingur 2010, arbeiðir í Frítíðarskúlanum á Argjahamri.*
*– Eg stilli upp til námsfrøðingaráðið, tí eg vil vera við til fortelja um alt tað stóra arbeiðið, sum vit námsfrøðingar gera, og geva mítt íkast til at styrkja um tað námsfrøðiliga økið. Eg arbeiði sjálv í frítíðarskúla og haldi, at serliga hetta økið verður eitt sindur gloymt, og ov lítið fokus er á øllum tí stóra arbeiðinum, sum námsfrøðingar og hjálparfólk gera á frítíðarskúlaøkinum. Meiri tvørfakligt samstarv eigur at vera ímillum skúla og frítíðarskúla fyri at skapa teir bestu menningarmøguleikarnar fyri børnini, sum vit øll eru um og saman við. Eisini eigur at vera meira samstarv fra dagstovni til frítíðarskúla, tá børnini byrja í skúla og frítíðarskúla. Hetta fyri at skiftið er so trygt, sum til ber, og vit sum fakfólk eru við til at møta børnunum, har tey eru og kunna seta inn beinanvegin, um til dømis serligar avbjóðingar eru*

# Harald Joensen:
# Ymiskleikin førir okkum á mál

**Fleiri skulu lesa námsfrøði, og alt økið má raðfestast. Løn og viðbøtur fyri ólagaliga arbeiðstíð, styttri arbeiðsvika, seniorpolitikur og eftirlønargjald, álitisfólkaskipanin og arbeiðstíðarreglur fyri øll øki. Tað eru hjartamálini hjá Haraldi Joensen, nevndarvalevni**

VALGREIN

Eg eiti Harald Joensen og varð útbúgvin sum námsfrøðingur á Fróðskaparsetrinum í 2021. Eg arbeiði á einum bú- og viðgerðarstovni fyri børn og ung við autismu hjá Almannaverkinum. Eisini eri eg samskipari í ungdómshúsinum Argjaskotið á Argjum.

Eg havi annars nógvar og góðar royndir á bæði dagstovnaøkinum og serstovnaøkinum – royndir og vitan, sum eg haldi vera til gagns í nevndararbeiðinum í Føroya Pedagogfelagið.

Eg bleiv valdur í nevndina, tá Katrin Karlsdóttir Johansen fór úr nevndini, eftir at hennara skeið sum varafólk rann út í 2020. Eg havi tískil sitið í nevndini tey seinastu tvey árini. Tað hava verið tvey lærurík ár fyri meg, men eg haldi ikki, at mítt arbeiði í felagnum er liðugt enn.

Vit eru í einari tíð, har tað námsfrøðiliga økið er undir stórum trýsti. Tað er sera ringt at manna øll støv á tí námsfrøðiliga økinum, og Pedagogfelagið eigur tí at leggja eitt stórt trýst á ta politisku skipanina fyri at fáa fleiri lesandi inn at lesa námsfrøði.

Men tað er ikki bara at fáa fleiri at lesa námsfrøði, alt økið má eisini raðfestast, ikki minst løn og viðbøtur fyri ólagaliga arbeiðstíð, styttri arbeiðsvika, seniorpolitikkur og eftirlønargjald, álitisfólkaskipanin og arbeiðstíðarreglur fyri øll øki.

Eg haldi, at vit sum felag miðvíst eiga at fáa lønina hjá øllum okkara limum upp. Tí vil eg fegin arbeiða



*Harald Joensen hevur sitið í nevndini í tvey ár og stillar nú upp til eitt fult trý ára skeið, og hann hevur fleiri mál á skrá at virka fyri*

Mynd: Kári við Rættará

við eini langtíðarætlan fyri lønartalvuna, og hvussu vit kunnu flyta lønirnar upp á eitt gott og nøktandi støði fyri allir limirnar í Føroya Pedagogfelag.

Felagið hevur nógvar limir, sum arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, og eg haldi, at viðbøturnar fyri ólagaliga arbeiðstíð hjá okkara limum eru alt ov lágar.

Eg haldi, at viðbótin eigur at vera roknað við støði í tímalønini á endastignum hjá námsfrøðingunum heldur enn, sum nú, við støði í tímalønini á stigi 11 í lønartalvuni.

Tað hevur leingi verið tosað um at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar. Ein kanning, sum í fjør bleiv gjørd fyri fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, vísir greitt, at tað at kalla bara eru fyrimunir við eini styttri arbeiðsviku. Eg haldi, at nevndin í Pedagogfelagnum skal ganga á odda í hesum arbeiðinum og sannføra ta politisku skipanina um, at hetta er ein skilagóð loysn.

Nógvir limir í Pedgogfelagnum arbeiða niðursetta tíð, og fyri teir er ein styttri arbeiðsvika ein góð loysn.

Eisini haldi eg tað hava týdning, at Pedagogfelagið í samráð við Fíggjarmálaráðið og kommunurnar fær grundfest ein virknan seniorpolitikk fyri limir í Pedagogfelagnum.

Um vit øll skulu halda til eitt langt lív á tí námsfrøðiliga økinum, so hevur tað týdning, at vit fáa ein seniorpolitikk at lætta um tíðina upp undir pensjónsaldur. Eitt nú kundi hetta verið gjørt við niðurskurði í arbeiðstíðini, uttan at lønin varð skorðin samsvarandi.

Nú vit tosa um seniorpolitikk, so slepst ikki uttan um eisini at hugsa um eftirlønargjaldið hjá limunum í Pedagogfelagnum. Hetta gjaldið er lágt samanborið við onnur fakfeløg á arbeiðsøkinum, og tí skal hetta eisini raðfestast høgt til næstu samráðingar.

Álitisfólkini eru millumlið ímillum felagið og limirnar. Álitisfólkaskipanin hevur tí sera stóran týdning fyri felagið, og eg haldi, at álitisfólkaavtalan eigur at vera dagførd, soleiðis at tað gerst meira áhugavert at vera álitisfólk í Pedagogfelagnum.

Pedagogfelagið hevur eina avtalu um arbeiðstíðarreglur fyri tey, sum arbeiða hjá landinum. Men eg haldi, tað hevur týdning, at vit fáa arbeiðstíðarreglur fyri alt tað námsfrøðiliga økið – tað er hjá Almannaverkinum, á dagstovnaøkinum og í skúlunum.

Hetta fer at bøta um arbeiðsumstøðurnar á øllum tí námsfrøðiliga økinum, og tað hevur alstóran týdning fyri bæði trivnaðin hjá starvsfólkum og fyri at vaksa um áhugan hjá fólki at koma inn á tað námsfrøðilga økið at arbeiða.

Um tú kæri limur ert samdur við mær í, at ymiskleikin hevur týdning fyri felagið og tekur undir við mínum hugsanum, so vóni at fáa tína atkvøðu á nevndarvalinum. Afturfyri skal eg lova, at mín lutur ikki skal liggja eftir, verði eg valdur.

**Harald Joensen,**
**námsfrøðingur,**
**valevni til nevndina**

# AIEJI-ráðstevna í Sveis í september

**Fyrsti regluligi aðalfundur og ráðstevna hjá AIEJI við Jógvani Philbrow sum aðalskrivara verður tíðliga í heyst. Heitið á ráðstevnuni hesa ferð er Temporality in Educational Action**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

6. – 9. september hevur altjóða felagsskapurin fyri sosialnámsfrøðingar, AIEJI, ráðstevnu í Lausanne í Sveis.

Seinastu setuna, sum eigur at vera fýra ár, men er blivin fimm ár vegna koronu, hevur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, verið aðalskrivari í felagsskapinum.

Ráðstevnan hjá felagsskapinum, sum á enskum verður róptur International Association of Social Educators, er vanliga fjórða hvørt ár, og hann skuldi av røttum havt verið í fjør, men bleiv útsettur til í ár vegna koronu.

Talan er formliga um ein aðalfund, sum samstundis verður fyriskipaður sum ein altjóða ráðstevna við nógvum fjølbroyttum fyrilestrum og verkstovum.

Fyrstu ferð Føroya Pedagogfelag var við, var á várið í 2009, tá ráðstevnan var í Keypmannahavn undir heitinum The Social Educator in A Globalised World. Tá var samstarvið



*Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, er aðalskrivari í AIEJI*

millum norðurlendsku fakfeløgini á sosialnámsfrøðiliga virkisøkinum væl umboðað.

Aftur á várið í 2013 var nevndin í Føroya Pedagogfelag við; tá var ráðstevnan hildin í Luksemborg undir heitinum Integration and Social Inclusion.

Á várið í 2017 var ráðstevnan í Brasil og hevði heitið I Am, Because We Are. Tá var, so frægt Føroya Pedagogfelag veit um, eingin við úr Føroyum – helst tí at leiðin til Brasil er so long.

Á heystið 2017 varð tó kallað inn til eykaaðalfund í Portugal, tí aðalskrivarin, ið var úr Norra, hevði sagt seg frá av heilsuávum.

Tá var Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, av sínum norðurlendsku samstarvsfeløgum innstillaður til starvið sum aðalskrivari og varð valdur.

Forseti í AIEJI er Benny Andersen, formaður í danska Socialpædagogerne, sum verður gestarøðari á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag.

Heitið á ráðstevnuni í heyst er Temporality in Educational Action, ið kann týðast til "Bráfeingi í námsfrøðiligum atgerðum". Allir limir í Føroya Pedagogfelag hava møguleika at bjóða seg fram við verkstovum, fyrilestrum og líknandi á ráðstevnuni (sí lýsing niðanfyri).

# AIEJI-RÁÐSTEVNA 6. – 9. SEPTEMBER

Í heyst hevur altjóða felagsskapurin fyri sosialnámsfrøðingar, AIEJI, aðalfund og ráðstevnu í Lausanne í Sveis.

Heitið á ráðstevnuni í heyst er ***Temporality in Educational Action***, ið kann týðast til **"Bráfeingi í námsfrøðiligum virki"**.

Aðalfundurin, ið skuldi vera í 2021, varð útsettur til 2022, vegna koronu, og tí hava tit nú møguleika at bjóða tykkum fram til henda 20. aðalfundin og ráðstevnuna hjá AIEJI, sum verður í Lausanne í Sveis 6. – 9. september 2022.

aieji2022.ch

**Til ber at kunna seg nærri og tekna seg á https://aieji2022.ch/en/)**

XXth WORLD CONGRESS
06-09.09.2022 - LAUSANNE - SWITZERLAND
aieji2022.ch



*Valborg Heradóttir Hammer hevur havt sæti í nevndini í trý ár. Hon heldur tó, at eitt skeið er ov stutt tíð at arbeiða við sínum hjartamálum – serliga tá eitt ár í barnsburðarfarloyvi eisini er farið burturav – og nú bjóðar hon seg fram til enn eitt skeið í nevndini*

*Mynd: Kári við Rættará*

## Valborg Heradóttir Hammer:

# Vit skulu duga at tosa fakið upp

**Valborg Heradóttir Hammer stillar upp til enn eitt skeið í nevndini hjá Føroya Pedagogfelag. Fyrireikingartíð og betri løn eru ímillum hjartamálini – og ikki minst ein betri tóni, so námsfrøðiliga fakið verður tosað upp og fær tign ímillum fólk**

VALGREIN

Eg eiti Valborg Heradóttir Hammer, eri fødd og uppvaksin í Klaksvík, men síðan eg byrjaði at arbeiða í Havn í 2008, havi eg fyri tað mesta búð har. Eg varð útbúgvin námsfrøðingur í 2017, eri 34 ára gomul, búgvi saman við unnustanum Tóra, og saman eiga vit ein son.

Eg byrjaði annars at arbeiða í barnagarði/vøggustovu í 2007 í Klaksvík, og í januar 2008 fór eg til Reykjavíkar at arbeiða í vøggustovu í nakrar mánaðir. Heimafturkomin fór eg at arbeiða á dagstovnaøkinum í Tórshavnar Kommunu. Tá eg las, loysti eg eisini av á serøkinum í nøkur ár.

Í dag eri eg leiðari í Býlingshúsinum í Maritugøtu, men havi hetta seinasta árið verið í barnsburðarfarloyvið.

Góð fyrireikingartíð og betri løn eru eisini míni hjartamál, og harafturat haldi eg tað vera sera umráðandi, at vit øll fara at duga betur at tosa okkara fak upp.

At arbeiða við menniskjum er jú ógvuliga gevandi og læruríkt. Men seinastu árini hava vit upplivað, at tað gerst alsamt tyngri at arbeiða vegna starvsfólkatrot, og serliga eru tað námsfrøðingarnir, sum eru ein mangulvøra.

Tí er tað ógvuliga týdningarmikið, at vit aftur fara at tosa okkara fak upp, tí innast inni vita vit, at vit hava heimsins besta starv, sum hevur uppiborið ta tign, vit sjálv vilja geva tí.

Verði eg vald í nevndina, fari eg at brúka orku uppá at fáa ein góðan tóna rundan um okkara fantastiska fak og starv aftur. Vit eru í einum dali nú, men vit mugu syrgja fyri at koma úr hesum dalinum aftur og hyggja frameftir.

Eg bleiv vald í nevndina í 2019, men havi sum sagt verið eitt ár í barnsburðarfarloyvi í nevndarskeiðnum. Eg føli, at eitt valskeið er ov stutt, og eg haldi meg enn hava nógv eftir at arbeiða við og fyri í felagnum.

Tí er tað mín vón, at tit kæru limir enn hava álit á, at eg kann gera mun í Føroya Pedagogfelag og velja meg til enn eitt trý ára skeið í nevndini.

**Valborg Heradóttir Hammer**
**námsfrøðingur, valevni til nevndina**



*Gunnvá Akraberg Hansen, námsfrøðiligur atstøðingur, hevur havt sæti í nevndini hetta seinasta árið sum varalimur fyri Valborg Heradóttir Hammer. Nú bjóðar hon seg fram til eitt nýtt skeið í nevndini*

*Mynd: Kári við Rættará*

## Gunnvá Akraberg Hansen:

# Eg havi nógv eftir at gera

**Gunnvá Akraberg Hansen vónar, at politikkararnir loksins fara at síggja virðið í arbeiðinum hjá námsfrøðingum og námsfrøðiligum hjálparfólki. Hon stillar upp aftur til nevndarvalið, tí hon heldur seg hava nógv eftir at bæði gera og geva**

**VALGREIN**

Eg eiti Gunnvá Akraberg Hansen, eri 54 ár, búgvi í Havn og arbeiði sum námsfrøðiligur atstøðingur. Eg arbeiði á dagstovninum Lítlaskógi í Havn og á Sambýlinum Hóvabrekku á Argjum. Sambýlið er stovnur undir Almannaverkinum, so eg havi royndir á bæði dagstovnaøkinum og serstovnaøkinum.

Eg havi havt sæti í nevndini eitt heilt trý ára skeið, men á nevndarvalinum seinast gjørdist eg akkurát ov stutt til afturval. Tað rakk tó so langt, at eg bleiv fyrsta varafólk, og síðan Valborg fór í barnsburðarfarloyvi stutt eftir aðalfundin, havi eg havt sæti í nevndini í hennara stað.

Nú havi eg so gjørt av at royna aftur, tí eg haldi, at eg havi nógv eftir at gera – og geva.

Styttri arbeiðsvika og ein virkin seniorpolitikkur, sum vóru míni hjartamál seinast, eru enn eins aktuell at stríðast fyri. Og løn og arbeiðsumstøður ikki minni.

Tað er ongin loyna, at eg als ikki eri errin av sáttmálasemjuni, vit endaðu við at gera, eftir at hava verið í verkfalli. Men har var lítið í at velja, tí støðan var fastlæst, longu tá vit settu okkum við samráðingarborðið. Arbeiðsgevararnir vóru ikki at vika, og skuldu vit raðfesta nakað yvirhøvur, so var kravið, at raðfestingarnar fóru av lønarkarminum.

Undir verkfallinum blivu allar kanónir vendar ímóti okkum, tí sum ikki einaferð fór alt at snúgva seg um, at lív og heilsa hjá teimum veikastu fólkunum á námsfrøðiliga økinum blivu sett í vanda, og tað vóru sjálvandi vit, sum áttu svartaper.

Men júst laka úrslitið av sáttmálasamráðingunum og verkfallið hevur gjørt, at eg ikki havi hug at steðga nú. Tað kann ikki passa, at hvørja ferð vit royna at bøta eitt sindur um lønina, so er svarið, at vit mugu vísa samfelagssinni, og leggja vit arbeiðið niður, so verða vit ákærd fyri at seta lív og heilsu hjá fólki í vanda.

Soleiðis er tað, sjálvt um tit námsfrøðingar og hjálparfólk hava staðið í fremstu røð á arbeiðsplássunum, meðan korona hevur herjað, og eisini hava vit øll hildið okkum aftur í privatlívinum fyri ikki at bera smittu inn á sambýli og stovnar. Dagstovnarnir hava havt opið sum vant, so samfelagið ikki bleiv lagt lamið. Har hava vit øll víst okkara virði, og eg haldi, at tað eisini má bera til at fáa okkara kosnu politikarar at síggja virðið í tí arbeiði, vit gera, og geva okkum løn og arbeiðsumstøður har eftir.

Nú korona hevur herjað í tvey ár, hevur nevndin ikki verið so víða, men verði eg vald í nevndina aftur, havi eg eitt stórt ynski um at sleppa út á bústovnar, verkstøð, dagstovnar og onnur arbeiðspláss at heilsa upp á tykkum limir, har tit eru, og síggja, hvussu tit skipa tykkara gerandisdag.

Eg bjóði meg sum sagt fram, tí eg haldi meg hava nógv eftir at gera og geva, og vónandi eru tað fleiri tykkara, sum halda tað sama og vilja atkvøða fyri mær. Verði eg vald, fari eg í hvussu er at gera mítt besta at liva upp til álitið.

**Gunnvá Akraberg Hansen, námsfrøðiligur atstøðingur, valevni til nevndina**



# FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI FYRI FARNA ÁRIÐ

**Nógv virksemi hevur verið á skrá hjá Føroya Pedagogfelag síðan seinasta aðalfund. Største einstaka hendingin var sáttmálasamráðingarnar, sum endaðu við bæði verkfalli og verkbanni, áðrenn semja var gjørd 19. juni. Niðanfyri hevur nevndin tikið kronologiskt saman um aðalfundarárið**

Hetta nevndarárið, byrjaði við einum stroymdum aðalfundi 6. mars 2021, har bert álitisfólk og umboð møttu á sjálvum fundinum á Hotel Føroyum.

Vit høvdu væntað at hetta var ein serstøða, og at koronastøðan fór at batna.

Soleiðis gekk tíverri ikki, og hava vit gjøgnum alt árið verið ávirkað av koronu.

Tað fyrsta nevndin tók støðu til, var tá Valborg H. Hammer fór í barsilsfarloyvi, og tí skuldi Gunnvá A. Hansen, fyrst valdi eykalimur, koma í nevndina í staðin.



*Nevndin í Føroya Pedagogfelag hetta seinasta árið – myndin er tikin, meðan verkfall og verkbann leikaðu upp á tað harðasta í juni. Uttast til vinstru er tað Birita Hammer Jacobsen, umsitingarleiðari hjá Føroya Pedagogfelag, og síðan nevndin: Harald Joensen, skrivari, Jógvan Philbrow, formaður, Annika Østerø, nevndarlimur, Gunnvá Akraberg Hansen, nevndarlimur – varalimur fyri Valborg Heradóttir Hammer, sum fór í barnsburðarfarloyvi beint eftir aðalfundin í fjør – og Nikkil Heinesen, næstformaður*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Hetta farna árið hevur nevndin verið skipað soleiðis: Jógvan Philbrow, formaður, Nikkil Heinesen, næstformaður, Harald Joensen, skrivari, Annika Østerø og Gunnvá A. Hansen, nevndarlimir.

## Mars

Í mars var felagið til hoyring í Løgtinginum um lógaruppskot um at seta økissálarfrøðing og seinni eisini lógaruppskot um barnaváttanir.

Somuleiðis vóru fundir um arbeiðsumstøðurnar hjá limum okkara, ið starvast í fólkaskúlanum.

## Apríl

Í apríl varð skipað fyri tiltaki fyri tænastumannasettar námsfrøðingar, har teirra viðurskifti vórðu viðgjørd.

Leiðaradagur var á Hotel Hilton 9. apríl. Tá var nýtt leiðararáð valt, og komu hesi fólkini í ráðið: Mirjam Johannesen, dagstovnsleiðari í Tórshavn, Turið Horn, dagstovnsleiðari í Tórshavn, Elisabeth Henriksen, eindarleiðari í Eind 9 Almannaverkið, Hans Andrias Olsen, frítíðarskúla- og dagstovnsleiðari í Rituvík, og Joan Midjord, leiðari í sjálvsognarstovni/serstovni í Klaksvík.

Eykalimur er Anna Maria Erlingsdóttir, dagstovnsleiðari í Vági.

Saman við Fakfelagssamstarvinum vóru vit eisini til hoyring um broytingar í lógini um Búskaparráðið og Landsbankan og "Uppskot til løgtingslóg um at banna mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum".

19. og 20. apríl høvdu vit arbeiðsdagar við KAF sum partur av sáttmálasamráðingunum. Her var talan um tveir evnisdagar, har tað bleiv arbeitt miðvíst við spurninginum um starvsfólkatrot og trivnað, og vóru evnisdagarnir ein roynd at finna felags forstáilsi fyri viðurskiftunum á tí kommunala økinum.

23. apríl skipaði Fakfelagssamstarvið fyri evnisdegi um sálarliga arbeiðsumhvørvið. Her luttóku umboð fyri arbeiðsgevarar, umboð fyri okkum fakfeløg og kommunulæknar.

Síðst í apríl vóru vit við til framløguna av várfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum, ein frágreiðing, ið setti sjóneykuna á starvsfólkatrotið

innan vælferðartænasturnar næstu 10 árini.

## Mai

Í mai vóru vit til nakrar samráðingarfundir. 7. og 8. mai høvdu nevnd og umsiting nevndararbeiðsdagar.

10. og 11. mai høvdu vit álitisfólkaskeið, modul 2.

Semingsstovnurin varð innkallaður, og varð fundur við Semingsstovnin 12. mai. Hjálparfólkaráðið hevði eisini eykaaðalfund hendan dagin. Í hjálparfólkaráðnum blivu tá vald: Sunrid Vatnsdal, forkvinna; Anne Lisa Davidsen, næstforkvinna; Oda Dalfoss, skrivari; Birgit Thomsen, kassameistari; Hansine Brandt, limur.

Seinna helvt av mai mánað fór í stóran mun til miseydnaðu semingsroyndirnar, sum vardu í fleiri dagar.

Undir semingsroyndunum gjørdu starvsfólk á dagstovninum í Kollafirði av at sjúkraskriva seg, og boðaðu tey frá, at hetta var fyri at mótmæla starvsfólkatrotið og aðrar ótolandi umstøður. Hetta tóku Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF, og Fíggjarmálaráðið, FMR, sum eina krígsavbjóðing frá Pedagogfelagnum – hóast felagið einki visti um ætlanirnar, og ikki hoyrdi um støðuna fyrr enn á semingsfundinum sama morgunin.

Í mai vóru vit í serligum gerðarrætti í einum máli um rætt til yvirtíð. Úrskurðurin kom í oktober.

## Juni

Í juni høvdu vit 24 tíma arbeiðssteðg, fyrst 3. juni fyri limir, ið starvaðust á vøggustovunum kring landið, síðan 4. juni fyri limir í Eind 9, ið umfatar vard verkstøð í Almannaverkinum. 7. juni var boðað frá 24 tíma arbeiðssteðgi fyri limir í fólkaskúlanum, og arbeiðsgevarin gjørdi tá av at verkbanna hesi. 14. juni varð so boðað frá verkfalli fyri allar limir felagsins, tó við undantøkum í Almannaverkinum. Hetta vardi eina viku – fram til 20. juni.

Serliga tvær sjáldsamar hendingar knýttu seg at stríðstigunum hjá okkum hesa ferð. Tann fyrsta var verkbannið hjá Fíggjarmálaráðnum ímóti limum okkara í fólkaskúlanum, eftir at hesir høvdu verið í 24 tíma arbeiðssteðgi. Tað margháttliga var, at Fíggjarmálaráðið eftir at hava verkbannað starvsfólkini kravdi, at hesi sjálv ásettu undantøk frá verkbanninum eftir ávísing frá sama Fíggjarmálaráði. Her vísti tað seg, at ávísingarnar vóru púra tilvildarligar, og tóktust ongar leiðreglur vera fyri, hví summi fingu undantøk og onnur ikki.

Hin sjáldsama hendingin var, tá eitt lógaruppskot um at steðga pørtum av verkfallinum var borið í Løgtingið úr Vinnumálaráðnum, har Helgi Abrahamsen tá var landsstýrismaður, longu áðrenn nakað verkfall yvirhøvur varð byrjað. Hetta, bara tí landsstýrismaðurin væntaði, at støðan kundi gerast hættislig. Um lógaruppskotið var samtykt, hevði verkfallið veruliga mist sína styrki, og um slíkt lógarsmíð verður praktiserað og samtykt í framtíðini, mugu vit rokna við, at verkføllini bæði fara at vara nógv longri og fara at hava negativa samfelagsliga ávirkan í longri tíðarskeið enn nú. Samstundis hevði hetta verið eitt stórt afturstig fyri skipaða arbeiðsmarknaðin, og valdsbýtið ímillum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar hevði verið skeiklað í nógv størri mun, enn tað longu er í dag.

Henda hending hevði tó eisini tað góða við sær, at fakfelagsrørslan í Føroyum savnaðist og stóð lið við lið. Var uppskotið ikki tikið aftur, hevði aðalverkfall helst verið lýst fyri allan arbeiðsmarknaðin. Hetta, tí hini fakfeløgini mundu síggja, at um hetta bar til at gera ímóti Pedagogfelagnum, so bar tað eisini til at gera ímóti teimum.

Semja varð gjørd um kvøldið 19. juni, og varð verkfallið og verkbannið tí av 20. juni.

## Juli

Juli mánaði gekk í størstan mun út upp á at fáa endurgoldið mistu inntøkurnar hjá øllum tykkum, ið høvdu verið í verkfalli og vóru verkbannað. Vit takka tykkum fyri gott tol, tá alt ikki gekk heilt so skjótt, sum ætlað.

## August

August mánaði varð hampuliga friðarligur, tó lønarendurgjøld vóru framvegis á skránni.

24. august vitjaðu tey nýggju lesandi á setrinum.

Síðst í august varð fundur við Tjóðveldi um starvsfólkatrot á vælferðarøkinum.

## September

Í september vóru vit á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, har vit fingu innlit í og samskiftu um ymiskt rundan um námsfrøðiútbúgvingina. Fakfelagssamstarvið hevði ein felags fund, har kanningin um 37 tíma arbeiðsvikuna varð løgd fram fyri nevndirnar í samstarvinum.

Vit høvdu eitt mál um flokking av námsfrøðingum í forskúlum í Fasta gerðarrætti í september. Spurningurin fyri okkum var, um ikki vit bert eiga at hava eina flokking fyri námsfrøðingar í forskúlunum, og at tað tí ikki skal bera til at seta námsfrøðingar eftir aðrari flokking. Úrskurður var sagdur fimm vikur seinni, og kom gerðarrætturin til ta niðurstøðu, at tað væl ber til at seta námsfrøðingar í tíðaravmarkað størv ella størv við tíðaravmarkaðari játtan við aðrari flokking.

Farið var eisini í gongd við at finna út av, hvørjar ráðgevarar KAF og Pedagogfelagið skuldu hava í sambandi við kanningina “Tíð til annað arbeiðið”, sum sambært semjuni frá juni skuldi gerast. Valið fall á Gitte Klein, Hjørdis Gaard og Annu Mariu Veyhe. Í skrivandi løtu er fyrireikandi arbeiðið um at vera liðugt, og sjálv kanningin fer í gongd nú. Úrslitið verður eftir ætlan klárt, áðrenn summarið kemur.

Vit vóru eisini við á ráðstevnuni “Børn á breddan – barnalív skapa vit í felag”, sum Kommunufelagið skipaði fyri 29. september.

Felagið var eisini til hoyring í mentanarnevndini hjá Løgtinginum, um “Minstamark av tímum á dagstovnum” – tað er minimumsnormeringar – og vit vóru til hoyring í rættarnevndini um “Almenna lønartalvu”.

## Oktober

Í oktober var felagið á fundi við Høgna Warberg, nýggja ábyrgdaran fyri dagstovnaøkið í mentamálaráðnum. Eisini vóru vit til hoyringsfund hjá einum arbeiðsbólki, ið arbeiddi við einari heildarætlan um rúsevni.

Úrskurður var eisini sagdur í yvirtíðarmálinum, og staðfesti hann, at limir okkara eiga at fáa yvirtíð fyri

tímarnar, sum fara upp um 40 tímar í miðal um vikuna. Hetta var eitt mál, ið fylti nógv í umsitingini alt árið.

Álitisfólkaskeið, modul 3, var eisini á skrá hendan mánaðin.

## November

Í november luttók formaðurin fyri fyrstu ferð í tvey ár fysiskt á nevndarfundi í AIEJI, altjóða felagsskapinum fyri sosialpedagogar. Felagsskapurin hevur aðalfund og ráðstevnu í Sveis í september, og var skráin fyri aðalfundin umrødd á nevndarfundinum. Hetta er ein ráðstevna, ið serliga er ætlað námsfrøðingum á sosialpedagogiska virksiøkinum.

Í november bar eisini til at møta á norðurlendskum fundi í norðurlendska sosialpedagogiska felagsskapinum NFFS í Oslo.

## Desember

Í desember vóru vit saman við Fakfelagssamstarvinum boðsend til hoyringar í rættarnevndini hjá Løgtinginum, um møguliga stytting av arbeiðsvikuni.

Ein innanhýsis bólkur er settur og fór í desember til verka at arbeiða við at endurskoða arbeiðstíðarreglurnar.

Eisini var eitt umboð fyri Undirvísingarstýrið á fundi at umrøða, hvussu vit skulu arbeiða víðari við arbeiðsumstøðunum hjá limum okkara í fólkaskúlanum.

## Januar

Í januar var álitisfólkafundur og álitisfólkaskeið.

Eisini hevði Fakfelagssamtarvið felags nevndardag, har avtalan um Fakfelagssamtarvið varð endurskoðað og endurnýggjað. Hetta varð gjørt, samstundis sum at Fakfelagssamstarvið bleiv víðkað við einum fakfelag afturat, nevniliga Heilsuhjálparafelagnum. Fakfelagssamstarvið umfatar tískil nú Føroya Lærarafelag, Akademikarafelagið, Starvsfelagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, HAK, Heilsuhjálparafelagið og Føroya Pedagogfelag. Tilsamans hava hesi feløgini meira enn 7000 starvsfólk á almenna og kommunala arbeiðsmarknaðinum.

## Alt árið

Gjøgnum farna aðalfundarárið hevur eisini ávíst virksemi verði í P/F Fakfelag, sum eigur helvtina av tryggingarfelagnum LÍV, har okkara uppgáva er at arbeiða fyri, at kostnaðurin fyri tryggingar og eftirlønarumsiting gerst so bíligur, sum til ber, fyri tykkum limir.

Arbeiðstíðarreglur hava eisini verið nógv á breddanum, og arbeitt hevur verið við at fáa eina felags tulking av, hvussu sunnu- og heiligdagar eiga at telja og viðfarast.

Dátuverndarlógin hevur eisini verið eitt nýtt evni ígjøgnum alt árið, har nýggjar mannagongdir og dátuverndaravtalur skulu gerast.

Umframt alt hetta hevur umsitingin røkt fleiri limamál – givið ráð, vegleitt, skrivað skriv til arbeiðsgevarar og aðrar myndugleikar, soleiðis at rættindi, løn og eftirlønarviðurskifti eru í samsvar við sáttmálar og aðrar reglur, og ymiskt annað.

# Soleiðis virkar valskipanin

**1** Tú fært ein teldupost frá “survey.exact.dk” við heitinum “Pedagogfelagið, val av nýggjum nevndarlimum 2022”.

Telduposturin inniheldur eitt leinki, ið tú síðan skalt trýsta á. Leinkið leiðir teg til atkvøðusíðuna.

*Um tú enn ikki hevur móttikið teldupostin, kann tað vera, at
a) Telduposturin er farin í spam/uønsket mail/óynsktur teldupostur ella líknandi.
b) Føroya Pedagogfelag hevur skeivan teldupostbústað ella ongan teldupostbústað hjá tær, send so teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo at kanna tíni viðurskifti.
c) Tú ert ikki limur. Send teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo fyri at kanna tíni viðurskifti.

---

**2** Fyrsta síðan gevur tær eitt yvirlit yvir, hvør bjóðar seg fram, við mynd. Trýst á “Næsti” fyri at koma til sjálva atkvøðusíðuna.

---

**3** Á valsíðuni sært tú tey trý valevnini til nevndarvalið. Tú kanst atkvøða við at trýsta á navnið á viðkomandi valevni. Um tú ongan ætlar at velja, trýstir tú á “Næsti”.

---

**4** Eftir at tú hevur atkvøtt, fert tú á næstu síðu. Um tú ynskir at luttaka talgilt á aðalfundinum 5. mars 2022, skal tú svara “Ynski at luttaka á aðalfundinum 5. mars 2022.” Um tú ikki ætlar at luttaka, so trýstir tú á “Luttaki ikki”.

Fyri at koma víðari skalt tú trýsta á “Næsti”.

---

Valskipanin verður umsitin av J. Herluf Sørensen, og verður úrslitið kunngjørt á aðalfundinum.

Valskipanin til nevndarvalið letur aftur fríggjadagin 4. mars klokkan 12.00.

# KUNNING TIL LIMIRNAR

## Limaskapur

***Nýggir limir***

Fyri at gerast limur í Føroya Pedagogfelag er tað týdningarmikið, at ein boðar arbeiðsgevara sínum frá, at limagjald skal flytast til felagið.

Harumframt eiga nýggir limir at skráseta seg á heimasíðuni undir hesum leinkinum: pedagogfelag.fo/limaskapur

Ein gerst ikki limur bert við at skráseta seg á heimasíðu felagsins, og tí hevur tað týdning eisini at boða arbeiðsgevaranum frá ynskinum um limaskap. Harumframt er tað av alstórum týdningi, at allir limir, eisini nýggir, kanna sín lønarseðil fyri at vita, um limagjald verður flutt av lønini til felagið.

***Limir sum skifta starv***

Týdningarmikið er eisini, at limir sum skifta starv, boða arbeiðsgevaranum frá ynskinum um limaskap og fylgja við á lønarseðlunum, um limagjald verður flutt. Hetta fyri at tryggja, at teir ikki detta úr felagnum.

Orsøkin til hetta er millum annað, at limaskapur og tryggingarnar, sum felagið hevur teknað vegna limir sínar, hanga neyvt saman. Hetta merkir, at um onki limagjald kemur til felagið, so er ein heldur ikki fevndur av tryggingum felagsins.

Tá ið limir skifta starv, bústað, broyta navn ella annað, hevur tað týdning at boða felagnum frá hesum fyri at tryggja, at limirnir verða rætt skrásettir í skipanini hjá felagnum, soleiðis at felagið kann seta seg í samband við teir umvegis teldupost, telefon ella post. Broytingar í upplýsingum fara eisini fram á hesum leinki: pedagogfelag.fo/limaskapur

## Um skrivstovuna

Skrivstovan er vanliga opin mánadag til fríggjadag kl. 09.00 - 15.00.

Telefonin svarar mánadag til hósdag kl. 09.00 - 15.00.

## Brúka húsið í Tungugøtu

Eftir eina størri umbygging í húsinum er betri møguleiki hjá limum at brúka húsið til smærri fundir og tiltøk eftir avtalu.

Limir eru eisini altíð vælkomnir á gátt til ein kaffimunn í køkinum í kjallaranum. Møguleiki er at lesa ymisk bløð og faklig tíðindarit.

## Limaportalur

Limir kunnu gerast partur av limaportalinum hjá felagnum, sum gevur limum eitt limakort, ið kann brúkast til at fáa avsláttur í ymsum handlum kring landið. Limir kunnu skráseta seg á limaportalinum á hesum leinki: limaportalurin.pedagogfelag.fo/

Limakortið gevur avsláttur á hesum støðum – minst til at vísa limakortið, tá tú keypir:

## P/F Bygma Balslev

10 % í avsláttri fyri kontantkeyp.

Ikki galdandi fyri sertilboð og útsøluvørur.

### Bilrøkt
15 % í avsláttri til allar limir upp á olju og oljuskift, dekk, reingerð og rustviðgerð.

### P/F Jógvan Weihe
10 % í avsláttri upp á allar vørur, tó ikki, tá talan er um tilboð og útsølu.

### Valdemar Lützen Byggibúð og Lásatænasta og Rustfrí Heilsøla
15 % av øllum keypi í handli okkara. Tó so bjóða vit 10 % av el-maskinum.

### Vælvera Fitness
Tilboð til limirnar í Føroya Pedagogfelag.

### Brá (Norðskáli)
10 % í avsláttri av allari vøru, undantikið útsøluvøru og niðursetta vøru.

### Sorella
10 % av øllum klæðum – er bert galdandi fyri klæðir.

Um vøran er niðursett, verður avsláttur ikki latin.

### Hennara
10 % Í avsláttri av vørum, sum ikki eru niðursettar frammanundan.

### Teldutænastan
15 % í avsláttri í handlinum og 10 % á verkstaðnum, undantikið tilboðs- og útsøluvørur.

## Ársaðalfundurin hevur hesa fundarskrá:

A. Val av fundarstjóra og skrivara

B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin

C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar

D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar

E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar

F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins

G. Val av grannskoðarum

H. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi

I. Fráboðan um, hvør er valdur í nevnd og sum eykalimur

J. Ymiskt

# Kundaportalurin

Nýggi kundaportalurin er nú klárur.
Fá innlit í tínar uppsparingar og tryggingar.

**liv.fo**




samleikin | Hevur tú ikki Samleikan?
Sí meira á **samleikin.fo**

liv.fo